# Fiskidagalógin manglar dagføring

**Tá lógin um fiskidagarnar varð samtykt, varð eisini samtykt, at fylgja henni upp við eini frágreiðing um, hvussu veiðiorka varð roknað út. Hetta er ognantíð gjørt, sigur løgtingsformaðurin**

FISKIDAGAR
*Edvard Joensen*




Mynd - Edmund Joensen
Myndatekstur:
*Løgtingið hevur viðhvørt verið ov galant mótvegis landsstýrismonnum, sum hava fingið rættiliga víðar heimildir Men tað broytist nú, løgtingsmenn seta landsstýrismonnum spurningar um øll møgulig mál, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður*

Løgtingið hevur viðhvørt verið ov galant og latið landsstýrismonnum ov nógv vald, ásannar løgtingsformaðurin, Edmund Joensen. Men tað er við at broytast nú, sigur hann.

Edmund Joensen er samdur við Ivani Johannesen, fyrrverandi løgtings- og landsstýrismanni, sum í Sosialinum týsdagin segði, at Løgtingið í ávísum førum bara hevði verið ein avgreiðsluskrivstova hjá landsstýrismonnum. Millum annað var lógin um fiskidagar ikki fylgd upp, sum ætlanin var.

Ætlanin var, sigur Edmund Joensen, at lógin skuldi fylgjast upp av eini frágreiðing, sum skuldi siga frá, hvussu veiðiorka skuldi roknast út. Eitt nú, um skip vórðu lognd, fingu størri maskinorku, ella hvat nú kundi broyta veiðiorkuna. Men teir eftirfylgjandi landsstýrismenninir hava als ikki fylgt hesum upp, sigur Edmund Joensen, sum var løgmaður, tá lógin um fiskidagar varð gjørd.

Edmund Joensen, løgtignsformaður, sigur, at hann er samdur við teimum, sum meina, at fiskivinnumál í ávísum førum eru ov lætt umsitin. Tað eru gjørdar ov nógvar rammulógir, har landsstýrismenn hava fingið víðar heimildir at gera kunngerðir, sum so hevur verið umsitið eftir.

Løgtingsformaðurin heldur, at tað er neyðugt at endurskoða ta lóggávuna, sum ónøgd er við. Men tað verður stórarbeiði at fara ígjøgnum, tí tað má takast frá grundini, sigur hann.

Men tað verða altíð kunngerðir at finna í lógarverkinum, sigur Edmund Joensen. Tí málsøkið er soleiðis, at tað ber ikki til, at lóggeva um alt. Tað verður altíð okkurt, sum má ásetast við kunngerð.

Tað er rætt, at Løgtingið í ávísum førum tykist hava havt minni vald, enn landsstýrismenn. Men tað er broytt nú. Nú er tað heldur hinvegin, at landsstýrismenn vilja halda, at teir eru undir rættiliga strongum eftirliti av Løgtinginum. Eitt nú vísa teir mongu fyrispurningarnir á tingi tað, sigur Edmund Joensen, sum heldur tað vera í lagi, at tingmenn seta landsstýrismonnum nógvar spurningar um mál, teir umsita.

– Tað kann vera eitt sindur strævið viðhvørt, sigur løgtingsformaðurin, men tað er neyðugt og gott.

# Mars seldur til Hósvíkar

**Fyrrverandi línuskipið Mars, sum seinnu árini hevur verið brúkt í frálandavinnu, er selt til Hósvíkar. Tað er partafelagið Thor í Hósvík, sum hevur keypt skipið**

SKIPASØLA
*Edvard Joensen*




*Mars er seldur úr Sandavági til Hósvíkar. Skipið verður helst tómt fyri útgerð og síðan høgt upp, sigur nýggi eigarin*
*Mynd: Edvard Joensen*

Mars er seldur úr Sandavági til Hósvíkar. Partafelagið Thor í Hósvík hevur keypt skipið frá partafelagnum Hýsisá í Sandavági.

Mars er fyrrverandi línuskip, sum seinni árini hevur verið brúkt í frálandavinnu. Mars æt í síni tíð Eirikur jallur og var fyrsta føroyska skipið, sum varð yvirdekkað.

Hans Andrias Joensen, stjóri í felagnum Thor í Hósvík, sigur, at teir hava keypt skipið at hava til at taka.

Høvuðsorsøkin er, sigur hann, at Mars hevur sama slag maskinu, sum Tórsvík, sum Thor eisini eigur, og hon kann tí vera hent at hava sum eykalutir at taka til. Annars er ætlanin at taka innan úr skipinum ymiskt, sum nýtast kann. So sum nautiska útgerð o.t., sigur Hans Andrias Joensen. Helst verður skipið upphøgt, væntar hann.

Men fyrstu tíðina verður tað liggjandi í Hósvík sum goymsla, um til ber at siga so. Skipið skal goyma eitt fiskiloyvi hjá Leitissteini, sum Thor eisini eigur, men sum í løtuni er í frálandavinnu uttanlands og tí má geva fiskiloyvið frá sær. Fyri ikki at missa hetta loyvi, verður tað nú flutt yvir á Mars, sum fer at hava tað, til Leitissteinur kemur aftur.

Hvørki seljari ella keypari vilja siga nakað um prísin fyri Mars. Bert tað, at hann er lágur. Sum fyri ein væl brúktan Jeep, sigur seljarin.